# Føðingar



12. september fekk Liaghm, sum er 3 ár, eina lítlasystur. Hon eitur Kira. Hon var 52 cm long og vigaði 3536 gr. Foreldrini eita AnnMari og Patrick Nolan og búgva í Perth. Australia.



18. september fingu Vanja og Svein Petersen, Hvalba, ein son. Hann vigaði 3430 g og var 53 cm langur. Hann eitur Svend Sveinsson.

3. sept. fingu Senga og Bogi Vang, Newmachar, Aberdeenshire, ein son. Hann vigaði 3470 gr. og var 50 cm langur. Hann eitur Andrew James Napoleon.

14. september fingu Hergerð Andreasen og Martin Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2760.

16. september fingu Marina Popovic og Júst A. Johannesen, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3580 gr.

17. september fingu Armgarð og Atli Godtfred, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4050 gr.

18. september fingu Elsebeth Justinussen og Jón Tyril, Syðrugøtu, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3520 gr.

18. september fingu Saroya B. Dalsgarð og Hallur E. Thomsen, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4200 gr.

18. september fingu Halldis Müller og Bergtórur Bjarkhamar, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4090 gr.

19. september fingu Anna Hansen, Kollafirði, og Otto I. Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3980 gr.

19. september fingu Gunnvá Wardum og Jógvan K. Glerfoss, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4250 gr.

21. september fingu Tórunn Joensen og Rani Danielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4170 gr.

22. september fingu Joan Joensen og Leif Hovgaard, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4450 gr.

23. september fingu Birita og Janus M. Joensen, Norðragøtu, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4700 gr.

23. september fingu Charlotte Gylden og Kim Bogi Jacobsen, Holstebro, ein son. Hann vigaði 4570 gr. og var 53 cm langur.

24. september fingu Lotte Skifte Thomsen, Miðvági, og Jákup Arnholdt Lambaa, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

# Robert McLuckie vitjar í Suðuroy



*Eftir møtið í Kunoy vóru vit inni í einum hugnaligum og gomlum húsum í bygdini. Á myndini eru frá vinstru: Poul Jóhan Djurhuus, Robert Mcluckie og Regin Kunoy*

**Prædikumaðurin Robert Mcluckie úr N. Írlandi kom til Føroyar fyri trimum vikum síðani og hann hevur hesa tíðina vitjað samkomur í Norðoyggjunum, í Eysturoynni og á Streymoynni**

Eftir at hava ferðast hendavegin í 31 samfull ár, hevur hann fingið nógvar kærar vinir, sum eisini hava verið til reiðar at hýsa honum á hansara møtiferðum. Í hesum samanhangi er vert at nevna, at tað eru serlig lyftir í bíbliuni, sum eru bundin til tað at taka ímóti einum Harrans tænara. Upp ígjøgnum samkomusøguna í Føroyum eru nógvir vitnisburðir um hvussu Harrin signaði í fleiri ættarlið, har forfedrar hýstu Harrans vitnum, tá onnur koyrdi tey frá sær. Hann hevur búð hjá vinfólki bæði í Klaksvík og á Skálafjørðinum, og tá hann er í Suðuroy býr hann oftast í Vági.

Teir, sum hava ferðast við honum, sum tolkar, hava verið Ólavur Niclassen, Klaksvík, Jens Bech, Skála og Poul Jóhan Djurhuus. Hann hevur spent víða í teksti og evnum hesar tríggjar vikurnar:

*Hví skulu vit biðja?*
*Eri eg ein veruligur Kristin?*
*Tey fýra teknini undir krossfestingini.*
*Lærisveinurin, sum Jesus elskaði.*
*Tann fyrri og tann seinni Adam.*
*Minnismáltíð Harrans.*
*Støða okkara í Kristusi*
*fyri ein ókendan Gud o.s.fr.*

Hetta eru bert nøkur av evnunum, sum hann hevur talað hesi kvøldini til gleði og uppbygging fyri fólki og til eina málsliga roynd fyri teir, sum hava tolkað.

Tað, sum er serstakt við hesi vitjan er, at hetta er hansara seinasta vitjan í Føroyum. Hann verður 80 ár í desember mánaða, og hann og konan hava tikið tað avgerð, at ferðingin skal skerast munandi niður í komandi tíð. Men Robert Mcluckie hevur ferðast víða og nógv ígjøgnum sítt langa lív við evangeliinum, so hansara partur liggur ikki eftir, og vit meina, at hann kann við góðari samvitsku repa seglini.

Seinasta triðingin av vitjanini í Føroyum kemur hann at vitja í Suðuroy, har hann kemur at vitja allar brøðrasamkomurnar:

Sun. 28. sept. kl. 11.00 Vitni, Hvalba
Sun. 28. sept. kl. 15.00 Útifundur í Hvalba
Sun. 28. sept. kl. 18.00 Betania, Porkeri
Mán. 29. sept. kl. 20.00 Lopra, bygdahúsið
Týs. 30. sept. kl. 20.00 Salem, Tvøroyri
Mik. 01. okt. kl.20.00 Bethel, Vágur
Hós. 02. okt. kl. 20.00 Betania, Sumba

Poul Jóhan Djurhuus kemur at ferðast við honum í Suðuroynni. Seinasta møti á Føroyavitjanini verður sunnukvøldið í Elim í Søldarfirði, har samkoman ynskir at bjóða ein drekkamunn eftir møti, soleiðis at fólk fáa høvið at siga honum farvæl.

Vit fara at heita á fólk um at møta fjølmet til møtini og ein og hvør er hjartaliga vælkomin.

poul jóhan djurhuus
Gjaranes@post.olivant.fo

REYNI FINANS – lagalig bilfígging

Reyni Service og Auto Service bjóða seg nú fram við at fígga brúktar bilar við einans 25 % í útgjaldi, afturgjaldstíðin fyri bilar yngri enn 5 ár er maks 60 md. og fyri bilar eldri enn 5 ár er afturgjaldstíðin maks 36 md.

Reyni Service hevur opið á Hjalla og í Klaksvík leygardagin, har høvið er at frætta meiri um nýggju fíggingarmøguleikarnar.

Reyni Service leggur dent á at nýggja fíggingarátakið ikki er eitt mótspæl til aðrar sum fíggja bilar, men bert enn eitt tilboð til teirra sum ganga í bilkeypitonkum.